## Heidi spyr

Javnstøðunevndin og nevndin, ið virkar fyri at fáa fleiri kvinnur upp í politikk, skutu herfyri upp, at løgtingsmenn lata sessin frá sær í einar tvær til fýra vikur næsta ár, so fleiri kvinnur, sum eru varatinglimir, kunnu sleppa inn um tinggátt. Nú spyr Heidi Petersen, tingkvinna hjá Tjóðveldisflokkinum, Jóannes Eidesgaard, løgmann, hvat hann heldur um uppskotið, og um hann er sinnaður at gera nakað fyri at fáa tað framt í verki.

## Country úr Klaksvík til Vág

Norðurlandahúsið skipar fyri konsertferð við Peter Abrahmsen & Bell Pepper Boys, Glymur og Stanley Samuelsen. Konsertirnar verða í Atlantis í Klaksvík, Norðurlandahúsinum í Havn og í Vági. Peter Abrahamsen og hansara Bell Pepper Boys hava seinastu 10 árini spælt í Danmark og øðrum Norðurlondum. Sjálvir siga teir seg hava "underholdning med en vis kant" og tónleikastílurin er líkist mest kontri blandað við fólkatónleiki.




# Vinnan skal hava kappingarførar karmar

**Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, heldur tað vera umráðandi, at politiski myndugleikin stendur saman um og heldur fast um ta menning, sum er í vinnuni**



Lutfalsligi parturin í búskapinum hjá øðrum vinnum er vorðin størri. Fiskur telir í dag eini 60% í samlaða búskapinum, meðan eini 30% stava frá øðrum vinnum

Mynd: Vilmund Jacobsen

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í samrøðu við Sosialin í gjár, segði landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, at gongdin í føroyskari vinnu er, at aðrar vinnur enn høvuðsvinnan í størri mun enn áður eru farnar at kasta av sær til føroyska búskapin.

Sum landsstýrismaður í vinnumálum segði hann seg fegnast hesa gongd.

- Eg sigi hetta ikki fyri á nakran hátt at seta niður á fiskivinnuna, sum framvegis er okkara nógv største útflutningsvinna, men fyri at vísa á tað positiva, at gongd er í øðrum vinnum eisini.

Hann vísti á, at í samlaða búskapinum eru aðrar vinnur farnar at "muna", og tað er ikki minst í hesum vinnum, vit síggja ta menning, sum er í samfelagnum.

- Lutfalsligi parturin hjá øðrum vinnum er soleiðis vorðin størri. Fiskur telir í dag eini 60% í samlaða búskapinum, meðan eini 30% stava frá øðrum vinnum.

### Ein spegilsmynd

Landsstýrismaðurin sigur, at hóast afturgongd var í høvuðsvinnuni í eini 2-3 ár, vaks arbeiðsloysið merkiliga lítið, og tað sigur okkum, at fólk eisini fingu úrtøku í øðrum vinnum enn høvuðsvinnuni.

- Parturin, sum høvuðsvinnan tjenar til búskapin, minkar kanska ikki í krónum og oyrum, men lutfalsligi parturin av samlaðu inntøkuni er vorðin minni seinastu árini. At føroyingar seinastu árini nú eisini eru farnir at skipa fyri altjóða vinnustevnum, er gott dømi um, at meira rørir seg millum manna enn tað, vit eru von við, heldur hann.

Í hesum sambandi sipar Bjarni Djurholm eitt nú til altjóða vinnustevnuna Faroexpo, sum í hesum døgum er í Ítróttarhøllini í Runavík.

- Hetta er ein spegilsmynd av tí, sum hendir í samfelagnum, leggur hann aftrat.

Hann vísir á, at vit í dag hava nógvar føroyingar, sum á ymiskan hátt virka burturi í heimi – við fyritøkum, fyri føroyskar fyritøkur ella í starvi hjá øðrum, sum hava eina útlendska fyritøku.

### Góðir karmar

Bjarni Djurholm vísir á, at ein vinna, sum støðugt er veksandi í Føroyum, er ferða- og flutningsvinnan, sum helst umboðar størsta einstaka partin av øðrum vinnum enn høvuðsvinnuni.

- Jú, tað er gleðiligt, at grundarlagið undir búskapinum gerst meira fjøltáttað, soleiðis at tað ikki verður so avgerandi tengt at gongdini í fiskivinnuni.

Landsstýrismaðurin heldur tað vera umráðandi, at politiski myndugleikin eisini stendur saman um og heldur fast um ta menning, sum er.

- Vit mugu soleiðis tryggja vinnuni kappingarførar karmar við eitt nú hóskiligari vinnulóggávu, skattalóggávu og avgjaldslóggávu, soleiðis at vit eru kappingarførir mótvegis teimum, vit kappast ímóti, sigur Bjarni Djurholm.



*- Tað er gleðiligt, at grundarlagið undir búskapinum gerst meira fjøltáttað, soleiðis at tað ikki verður so avgerandi tengt at gongdini í fiskivinnuni, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum*

Mynd: Vilmund Jacobsen